## Oyggjablað úr Oyndarfirði

**Mikudagin verður Oyggjablaðið aftur í Sosialinum. Hesaferð verður fokus sett á Oyndarfjørð. Lesið í komandi Oyggjablaði:**


Eivind (83) hevur handlað í 69 ár


Maria úr Gøtu arbeiðir fisk


Sigmund gleðir seg til nýggju urguna



Niels Jacob trívist í kuldanum


Borghild úr Havn finnur friðin

# Ferðavinnan má raðfestast hægri

**– Tíðin har útlendsku krabbagággurnar gingu runt geilarnar og einki lótu eftir seg er ein gomul táta og hevur einki við veruleikan at gera, sigur Fríðtór Debes, leiðari á Sandoyar Kunningarstovu. – Tær skulu so sanniliga verða vælkomnar til Føroyar.**

Snorri Brend


*– Ferðavinnan kann mennast enn meiri, men so mugu politikkararnir vakna, sigur Fríðtór Debes, leiðari á Sandoyar Kunningarstovu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ferðavinnufelagið hevur lagt fram tøl, sum vísa at ferðavinnan gevur út ímóti 800 mió krónum til føroyska búskapin um árið.

– Hetta eru ikki hissini tøl, sum eiga at geva øllum - og serliga okkara politikkarum - nakað at hugsa um, sigur hann.

– Tað er tí uppá hægstu tíð, at okkara politikkarar byrja at raðfesta ferðavinnuna hægri enn teir gera, sigur Fríðtór Debes.

Ein veruleiki er, at ferðavinnan er skjótast veksandi vinnan í heiminum í dag. Og tað er einki mark fyri, hvussu nógv hon kann veksa og kasta av sær runt land okkara. Her er tað bert hugflogið, ið setir mark.

– Føroyar eru ein sera spennandi marknaður fyri eina ørgrynnu av ferðafólki, tí tey eru troytt av stórbýar lívi og tí, ið tað ber við sær.

– Tey leingjast til tað forkunnuga, og her kann okkara deiliga land rættiliga koma í fokus, sigur Fríðtór sambært Sandoyarportalinum.

Og hann leggur aftrat:

– Hugsa vit okkum, at vit øll, ið eru í hesi virkisgrein, gera meira fyri, at hon skal veksa, so skuldi einki verið í vegin fyri, at hon til dømis vaks við 10% fyrsta árið, - og tá tosa vit í pengum um einar 80 mill. kr. árliga í vøkstri.

# Ein dagur fyri hjúnini



**Leygardagin 26. mars verður skipað fyri einum hjúnabandsdegi í Hoyvíkar kirkju- Tiltakið vendir sær til øll hjún í økinum.**

Tað eru prestarnir í Suðurstreymoy sum hava tikið stig til henda dagin, sum verður fyriskipaður við fyrilestrum og orðaskifti.

Til tiltakið hevur tað eydnast teimum at fáa fatur á havnarmanninum Fróða Madsen, cand. ped. psyk., og sum býr í Danmark.

Hann skal halda tríggjar fyrilestrar um hjúnabandið generelt, hjúnabandið í kristiligum høpi og um samskiftið og kenslur í hjúnabandinum.

Hjúnabandsdagurin byrjar klokkan 9:30 og heldur fram til út á seinnapartin. Fyri at lætta um hjá fólki verður eisini skipað fyri tilttøkum fyri børnini, meðan tey vaksnu eru til fyrilestrarnar.

Tiltakið er ókeypis.

snorri@sosialurin.fo

# Gott nýggjár í Sumba

Undan nýggjárshaldinum seinast var eitt ávíst orðaskifti í bygdini um, hvussu hetta skuldi fara fram og nær tað skuldi haldast.

Eitt úrslit av hesum orðaskiftinum var hugskotið at skipa eina beinleiðis nýggjársnevnd at taka sær av hesum.

Og henda nevndin verður nú veruleiki. Fríggjakvøldið 11. mars verður nevniliga boðið til fundar í Sumbiar skúla, har ein slík nýggjársnevnd skal skipast.

Sagt verður, at seinastu árini hava somu persónar skipað fyri nýggjársbáli og kyndlagongu í bygdini, men at ein nú ynskir at fleiri henda ur verða um hetta tiltakið.

– Soleiðis kann nýggjárshaldið gerast bæði størri og betri, skrivar Sumbiar kommuna á heimasíðu sínari.

Ætlanin er at fáa eina siðvenju í lag, sum kann miðsavna bygdarfólki til bæði nýggjársbálið og kyndlagonguna.

snorri@sosialurin.fo